## Toppleys handtøka

Kvinnur hava fullan rætt at dreiva toppleysar runt í gøtunum í New York. Tað eru enntá eini borgararættindi. Tað er greitt eftir at ein kvinna hevur fingið 160.000 krónur í endurgjaldi fyri eina handtøku, har hon var fongslað í 12 tímar, fyri at hava gingið í býnum í berum yvirbelti. Kvinnur hava rætt til – eins og menn – at ganga toppleysar í statinum New York, tað varð sligið fast við einum dómi longu í 1992. Kvinnan, 27-ára gamla Jill Coccaro, segði við New York Post, at hon javnan gekk við naknum yvirbelti, tí hon helt tað vera náttúrligt.



## Skattaavtala undirskrivað

Dupultskattasáttmáli er nú gjørdur millum Føroyar og Bretland. Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, og Dawn Primarolo MP, bretskur skattamálaráðharri, hava undirskrivað dupultskattasáttmála, sum ber í sær, at borgarar og fyritøkur ikki gjalda dupultan skatt, tá arbeitt verður í londunum báðum. Trupulleikarnir av dupultskatti, sum bæði bretskar og føroyskar fyritøkur hava havt, tá hesi hava arbeitt ella virkað í londunum hjá hvørjum øðrum, skuldu frameftir verið burturbeindar.

# Ongin nýggjur tunnil til Hvalbiar næstu árini

**Hvalbingar mugu brynja seg við toli í fleiri ár afturat áðrenn teir fáa nýggjan tunnil**

TUNNILSGERÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Gongst, sum landsstýrismaðurin í Vinnumálum ætlar, ganga tað fleiri ár, áðrenn Hvalbiartunnilin verður dagførdur.

Bjarni Djurholm hevur beint nú sent bygdaráðnum í Hvalba skriv, har hann staðfestir, at ein nýggjur Hvalbiartunnilin er ikki tann tunnilin, sum verður raðfestur fremst, nú tey næstu árini skulu leggjast til rættis.

Landsstýrismaðurin er samdur í, at tunnilin er ikki tíðarhóskandi og at hann forðar bæði vinnulívi og fólki annars í at liva og virka.

Hann staðfestir, at Landsverk hevur viðgjørt alla samferðsluna í Føroyum sum heild og hansara niðurstøða er, at tað er ein betri loysn at gera nýggjan tunnil til Hvalbiar, heldur enn at hækka og breiðka tunnilin, sum er.

Men hann vísir á, at talan er um eina so mikið stóra verkætlan, at hon má raðfestast í kapping við aðrar verkætlanir, sum eisini eru neyðugar at gera.

Og sum íløgukarmarnir eru, ber ikki til at gera fleiri stórar tunlar ísenn.

Tí er ein ætlan løgd fyri, í hvørjari raðfylgju teir mest átrokandi tunlarnir skulu gerast.

Eftir teirri ætlanini er Hvalbiartunnilin ikki tann næsti, sum farið verður undir.



*Hvíta strikan vinstrumegin á loftmyndini vísir, hvar vegur og tunnilin ímillum Trongisvág og Hvalba er nú. Myrkara strikan høgrumegin vísir, hvar ætlanin er at gera nýggjan tunnil og veg, Hann kemur úr í dalinum í Hvalba og kemur sostatt at liggja nógv lægri enn tunnilin ger nú. Men eftir tí, sum liggur í kortunum nú, gaga nøkur ár, áðrenn hann verður veruleiki*

Tá ið Hovstunnilin er liðugur, er ætlanin at fara undir tunlarnar, sum ætlanin er at gera í Borðoy og í heyst verður verkætlanarlóg løgd fyri Løgtingið um teir, sigur Vinnumálaráðið við Hvalbiar Kommunu.

Men tá ið teir tunlarnir eru lidnir, er ætlanin at fara undir Hvalbiar tunnilin.

Men Bjarni Djurholm leggur afturat í skrivi sínum til Hvalbiar Kommunu, at hetta er sjálvsagt treytað av, at Løgtingið tekur undir við hesi raðfesting.

### Bíða 7-8 ár

Verður úrslitið, at arbeitt verður eftir ætlanini hjá landsstýrismanninum, er skjótt at rokna seg fram til, at tað ganga eini 7-8 ár, áðrenn koyrandi er til og úr Hvalba ígjøgnum ein nýggjan tunnil.

Í samferðsluætlanini hjá Landsverki verður mælt til at gera nýggjar tunlar í Borðoy ímillum Ánirnar og Árnafjørð upp á 3000 metrar og ímillum Árnafjørð og Norðtoftir upp á 2260 metrar og nýggjar vegir í hesum sambandi.

Tað eru hesir tunlarnir, sum Vinnumálaráðið sipar til í skrivi til Hvalbiar Kommunu, skulu gerast í Borðoy, áðrenn tunnilin í Hvalba verður gjørdur.

Tunlarnir verða á sama staði, sum tunlarnir nú eru og teir kosta 233 milliónir. Men harafturat skulu 30 milliónir brúkast til vegagerð.

Og nú arbeiðið er ígongd har á leiðini, mælir Landsverk eisini til at bøta um byrgingina um Haraldsund og kostnaðurin fyri tað, skal leggjast afturat.

Landsverk sigur at tað tekur fýra ár at gera sjálvar tunlarnar og verður fyrireikingararbeiðið talt við, verða teir sostatt ikki lidnir fyrrenn um eini fimm ella seks ár ella í 2012 ella 2013.

Síðani er ætlanin at fara í holt við Hvalbiartunnilin.

Landsverk metir, at tað fer at taka trý ár at gera tunnil og vegirnar, sum skulu til.

Eftir samferðsluætæanini hjá Landsverki er ætlanin at gera forkanningar í 2011 og í 2012 og at gera tunnilin og vegir í 2013-2015.

Og eftir raðfestingini, sum Vinnumálaráðið nú hevur stungið út í kortið, sær hetta út til at fara at halda nøkunlunda.

Ein nýggjur Hvalbiartunnil verður 2120 metrar langur. Tunnilin nú er 1450 metrar.

## Hvalbiartunnil loysir seg best

Hóast tunlarnir í Borðoynni eru teir, sum samfelagsliga loysa seg ringast av øllum at gera, verða tað teir, sum skulu gerast fyrst

Av teimum stóru fjallatunlunum, sum skulu gerast, loysir tað seg best fyri samfelagið at gera ein nýggjan tunnil ímillum Trongisvág og Hvalba.

Tað vísa nýggjar útrokningar hjá Landsverki.

Landsverk hevur gjørt kost-nyttu útrokingar av øllum tunlunum, sum ætlanin er at gera í Føroyum tey næstu árini

Og tær útrokningarnar vísa, at teir tunlarnir, sum tað samfelagsliga loysir seg ringast at gera, eru teir nýggju tunlarnir í Norðoyggjum.

Her er talan um eina íløgu upp á millum 263 og 292 milliónir, alt eftir, hvør loysn verður vald, men íløgan gevur eitt samfelagsligt hall upp á 286-386 milliónir, alt eftir, hvør loysnin verður vald.

Hinvegin er tað ein nýggjur tunnil ímillum ímillum Trongisvág og Hvalba, sum loysir seg best at gera.

Tað kostar 155 milliónir at gera nýggjan tunnil, men hann gevur heldur minni samfelagsligt hall, tí í hesum føri er hallið 150 milliónir, ella einar 130-230 milliónir minni enn teir nýggju tunlarnar í Borðoynni.

Kortini ætlar Vinnumálaráðið at gera tunlarnar í Borðoynni fyrst.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur áður sagt fyri Sosialinum, at orøkin til tað er, at fyrireikingarnar til Borðoyartunlarnar eru komnar rættiliga langt og at tað hinvgin tekur tað mesta av einum ári at fyrireika nýggjan Hvalbiartunnil og tá kann arbeiðið í Borðoynni longu vera komið hampuliga væl áleiðis.

# Hvalbingar krevja tunnil beinanvegin

**Bygdaráðið í Hvalba góðtekur als ikki ætlanina hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismaður**

TUNNILSGERÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hvalbingar góðtaka ikki, at teir skulu bíða í fleiri ár afturat eftir einum nýggjum, tíðarhóskandi tunli ímillum Trongisvág og Hvalba.

Tað staðfesti Bygdaráðið á fundi týskvøldið.

Bygdaráðslimir eru ikki sørt misnøgdir við skrivið, sum kommunan hevur fingið frá Vinnumálaráðnum um Hvalbiartunnilin og sum vit umrøða í aðrari grein her á síðuni.

Bygdaráðið samtykti at átala harðliga, at Bjarni Djurholm ætlar at gera tunlarnar í Borðoy, áðrenn ein nýggjur Hvalbiartunnil kemur upp á tal.

Bygdaráðið krevur, at ein nýggjur Hvalbiartunnil verður raðfestur frammanfyri tunlarnar í Borðoynni.

Bygdaráðslimir halda, at tað er undarligt, at tunlarnir í Borðoynni skulu raðfestast framum ein Hvalbiartunnil, tí í Borðoynni er at kalla steindeytt til vinnulív.

Hinvegin er rættiliga nógv virksemi í Hvalba við stórum flakavirki, trimum trolarum, trolvirki og alistøð, sum eru rættiliga nógv darvað av, at tunnilin er so lágur, at vanligir lastbilar og treylarar ikki fáa brúkt hann.

Tað merkir, at øll vøra og útgerð, sum kemur til Hvalbiar má lastast um í minni bilar, áðrenn tað slepst ígjøgnum tunnil. Samstundis mugu fiskavørur frá flakavirkinum koyrast ígjøgnum tunnilin í smærri bilum og lastast um í treylarar á Tvøroyri, áðrenn tað verður avskipað.

Tí eru bygdaráðslimir í Hvalba samdir um, at tað er nógv meiri átrokandi at fáa nýggjan tunnil til Hvalbiar, framum nýggjar tunlar í Borðoynni

Í bygdaráðnum í Hvalba eru tey so misnøgd við raðfestingina hjá Bjarna Djurholm, at bygdaráðið sendir mótmæli bæði til landsstýrismannin í Vinnumálum, Løgtingið og allar løgtingslimirnar fyri Suðuroy.